# Death Proof

## - Nýggja Tarantino-røðin er ein heilsan til 70'ara b-filmin

### Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

Quentin Tarantino er ímyndin av b-filminum og av postmodernaða leikstjóranum, sum altíð fer at blanda lágmentanina í sjálva æðraskipanina á hágmentanini.

Tarantino hevur altíð arbeitt við tí skitna (Pulp), við tí harðliga (Kill Bill, Resoir Dogs), og altíð møtast tað skitna og tað harðliga í einum løgnum estetiskum og tí nærum óetiskum heimi, fullkominliga hinumegin alla realismu og ikki minst sosialrealismu.

Í filminum Death Proof skal Jungle Julia, sum er plátuvendari, í býin við sínum vinkonum í Austin í Texas. Tær møta tó tí svaka mordarinum Stuntman Mike, sum er eftir teimum í sínum ógvusliga dreparabili.

### Retro og klisje

Sum ein 90'ara postmodernaður leikstjóri, so elskar Tarantino alt, sum er retro, super ironiskt og er á tremur við ávísingum hvørt triða sekund til onkran løgnan og kitsjkendan ræðufilm, sum eingin kennur longur ella hevur áhuga fyri.

Vit eru við hesum filminum farin inn í ein Grindhouse biograf



í 1974, har tey vístu óendaligar ringar filmar 24 tímar non-stop. Tónleikurin er eitt tað besta í hesum filminum.

### Sum ein teknirøð

Kurt Russell spælir hesin mordarin, kallaður nakað so kulørt og tekniseriukent sum Stuntman Mike. Filmurin er fullar av ørum biljaktum, sum vit kenna tær frá øllum hesum elendigu "bil-jakt filmunum" frá 70'unum.

Søgan er ótrúliga tunn, og alt lívir líkasum í hesum 70'ara retro og í postmodernaðu ironisku frástøðuni, sum alt skal síggjast í, sum hesin ummælarin er ótrúliga troyttur av.

Tað eru 13 ár síðani, at Pulp Fiction kom út, og kanska skuldi Tarantino flutt seg eitt vet. 90'ini eru væl og virðiliga liðug, men Tarantino ætlar sær ikki at koma úr slasher og b-film videokioskini, har hann er vanur við at síggja filmar um amazonurnar hjá Russ Meyer.

Filmurin er verdur at síggja, men skuffar tó, tí hann er so lítið sigandi.

**Death Proof GrindHouse Vol. 1**

| | |
|---|---|
| Kurt Russell | Stuntman Mike |
| Sydney | Tamiia Poitier |
| Jungle Julia | |
| Jordan Ladd | Shanna |
| Vanessa Ferlito | Arlene |

**Leikstjóri Quentin Tarantino.**
**112 minuttir.**
**Framførdur í Havnar Bio**



# Ocean´s 13

## - Clooney, Pitt, Damon aftur á ferð

Tað er torført at finna meiri vælumtóktar menn enn hesar Danny Ocean (George Clooney), Rusty (Brad Pitt), Linus (Matt Damon), Virgil (Casey Affleck) – at koyra allar í eina filmrøð má vera ein sikkur uppskrift til eitt brak.

Tað eru ikki bert Clooney, Pitt, Damon og Garcia, men við í filminum eru eisini fólk sum Al Pacino.Í 2001 kom so endurinnspælingin Ocean´s Eleven og í 2004 kom Ocean´s Twelve.

### 1959-2007

Fyrstu Ocean´s Eleven filmurin er frá 1959 við originala RatPack manningini - Frank Sinatra, Dean, Martin, Sammy Davis Jr., Peter Lawford og Joey Bishop - sum skuldu gera eitt rán í Las Vegas á eitt Casino. At so Dean Martin og Frank Sinatra í veruleikanum heldur gjørdu innbrot í hvørt barrskáp og runnu eftir konufólki, er ein onnur søga.

Søgan er hin vanliga, hesuferð er hevur Willy Bank (Al Pacino) snýtt Danny Ocean (George Clooney). Teir fara at hevna seg allir við at stjæla pening frá heimsins mest tryggu vaktarskipan.

Fínt undirhald, so er tað sakt, meiri er ikki at koma eftir.

| | |
|---|---|
| Danny Ocean | George Clooney |
| Rusty Ryan | Brad Pitt |
| Linus Caldwell | Matt Damon |
| Terry Benedict | Andy Garcia |
| Willy Bank | Al Pacino |
| Abigail Sponder | Ellen Barkin |

**Leikstjóri Steven Soderbergh. 122 minuttir. Frumframsýndur í Havnar Bio frá 8. juni.**

### Den grimme ælling og mig



er um ein ljótan dunnuunga. Tað er ikki ofta, at ein danskur teknifilmur kemur fram. Filmurin "Den grimme ælling og mig" er gjørdur við 3D animatión og er bara heilt góður. Eg haldi ikki, at søgan í "Den grimme ælling og mig" er so original. Filmur er verdur at hyggja eftir, men endar tó við for nógvum rópi og skráli. Sum heild er hann tó verdur at síggja.
**4 stjørnur av 6**

**Sprængfarlig Bombe** vísir, at kommersielli filmídnaðurin í Danmark eisini farið at skemta sær við at gera grin vil filmleikstjórum. Ulrich Thomsen spælir hin sálarliga sjúki Tony, ið júst er sloppin úr fongslinum. Hann fer í biograf við børnunum, men missur tamarhaldið, tí filmurin er so vánaligur. Filmurin er gjørdur av kenda Claus Volter (Nikolaj Lie Kaas). Børnini hata filmin, og Tony vil hava peningin aftur. Hann vil hava tær 471 krónurnar aftur, ið hann hevur brúkt. Tony endar við at leita eftir hesum Volter og hetta kemur mangt skemtiligt út av.




**3 stjørnur av 6**

Í **Fearless** spælir Jet Li høvuðsleiklutin í hesum aktion og "martial arts-filminum", ið byggir á veruligu søguna um kinversku legenduna Huo Yuanjia, sum í byrjanini av 1900'talinum bardist móti útlenskum veldi. Fearless er var ein stóru filmur í biografunum kring heimin, nú er hann so komin sum DVD.
**3 stjørnur av 6**

**Scoop** er ein av hesum nógvu Woody Allen filmunum, sum ikki eru ja, "ordiligir" Woody Allen filmar. H hann ger 1) álvarsligar/ stuttligar filmar, og so 2) hesar løgnu komediu/ krimifilmarnar, sum eg haldi eru ræðuliga skuffandi í mun til 1´arnar, sum er veruliga filmlistin hjá manninum. Allen gav okkum Manhattan, Annie Hall, Zelig, Interiours og onnur meistaraverk, í mun til hesar er hetta bara ordiliga keðiligt, javnt og líkamikið.




**2 stjørnur av 6**

**Rocky Balboa** er hin seinasti




filmurin í røðini um boksaran Rocky. Fyrsti Rocky-filmurin frá 1976 endaði, sum so nógvir filmar frá sjeytiárunum, sum ein klassikari. Stallone spælir væl í filminum. Hetta er ein sera góður endi á allari røðini, nógv betur enn II, III, IV og ikki minst V. Eingin stórur filmur, men gott undirhald.
**4 stjørnur av 6**